**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 0964**
**Tíðarskeið: 12-23/8 2009**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Mourits Mohr Joensen, Regin Kristiansen, Lis Larsen, Jens Arni Thomassen og Jákup Reinert.

**Ábyrgd:** Jákup Reinert, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var annar túrurin av yvirlitstrolingunum á sumri í ár. Høvuðsendamálið við hesum túrum er at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Magakanningar skulu eisini gerast av toski, hýsu og upsa. Umframt skal vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið verða veidd, og tilfar til m.a. aldursgreining av havtasku og svartkjafti skal eisini fáast til vega.

**Reiðskapur og útgerð:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinhamns lemmar. Breitlar 60 og 120 m. Vanligur grunnur. Hitamátari at seta á lemmarnar (Minilogg).

**Um túrin:** Hetta var annar túrurin av yvirlitstrolingunum á sumri í ár. Hetta er 12. árið, har gjørdir verða tveir túrar á 2 vikur og við 200 trolstøðum íalt. Støðirnar liggja spjaddar kring allan Landgrunnin, og tóvað verður í 1 tíma so vítt møguligt á sama tóvi ár undan ári (Mynd 1). Arbeitt verður alt samdøgrið. 135 trolstøðir vórðu tiknar á tí fyrra túrinum, so til hendan túrin vóru 65 trolstøðir eftir; tær lógu yvirhøvur vestan- og sunnanfyri.




**Mynd 1**. Yvirlitstrolingar á sumri við Magnusi Heinasyni. Landgrunnurin er býttur upp í 15 øki eftir dýpi og ætt. Ávíst tal á støðum verður tikið í hvørjum øki, tilsamans 200 støðir fyri allan Landgrunnin. Somu støðir verða tiknar á hvørjum ári.

Farið varð av Havnini kl. 23[15] tann 13/8, og kastað varð fyrstu ferð 14/8 kl. 03[10] í Vágahavinum (øki XII). 20/8 kl. 12[25] var seinasta støðin á túrinum tikin, og so varð siglt á Toftir at landa. Tá tað var liðugt, varð siglt á Havnina at rigga til at fara á Sjómannadag í Klaksvík.
Túrurin sum so gekst væl, og tað eydnaðist at taka allar tær ætlaðu 65 støðirnar. Tó var tað fast/skrætt 8 ferðir; hesar støðirnar máttu sostatt takast umaftur. Ta einu støðina í Sandshavinum (øki II, puntur 7) eydnaðist tað ikki at taka, hóast vit royndu 4 ferðir. Í staðin varð ein puntur tikin eystan fyri Sandoynna (øki II, puntur 13), og mælt verður til at strika punt 7 og taka punt 13 sum fasta støð framyvir.
Eitt yvirlit yvir allar støðir á yvirlitstrolingunum á sumri er í túrætlanini fyri hendan túrin (0964) og á Mynd 1.

**Talva 1.** Yvirlit yvir nytru- og magaprøvar á Magnus Heinason túri nr. 0964

| Toskur | Toskur | Hýsa | Hýsa | Upsi | Upsi | Svartkjaftur | Havtaska |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á magum | Tal á nytraðum fiski | Tal á nytraðum fiski |
| 315 | 76 | 348 | 69 | 274 | 44 | 29 | 12 |

| | |
|---|---|
| Tal á nytraðum fiski tilsamans: | 978 |
| Tal á magum tilsamans: | 189 |

**Prøvataking:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini, og eitt yvirlit yvir tal á nytru- og magaprøvum sæst í talvu 1. Samstundis sum nytrur vórðu tiknar, varð sum vant eisini skrásett longd, vekt, kyn og búningarstig, og regluliga vórðu magar tiknir av tí nytraða fiskinum.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Miðað verður eftir, at túrurin er klárur at leggja í basu í november.

**Fyribils úrslit:** Ikki fyrr enn nytrurnar eru lisnar, og øll data frá túrinum eru løgd í basu, ber til at siga nakað nágreiniligt um úrslitini av yvirlitstrolingunum á sumri í ár. Í talvu 2 er tó eitt yvirlit yvir øll sløgini, ið vórðu fingin á hesum túrinum, hvussu nógv varð fingið av hvørjum slagi, og á hvussu nógvum støðum tey vórðu fingin. Nógv mest varð fingið av upsa, og síðani komu gulllaksur, hvítingsbróðir, hýsa, toskur og lítli kongafiskur. 46 fiskasløg vórðu veidd íalt umframt høgguslokk (agnhøgguslokkur, mathøgguslokkur og tannhøgguslokkur), hummara, rækju og ymiskt annað, ið er bólkað sum skrambul, t.d. grót, krossfiskar og igulker. Um hugt verður at, hvussu títtleikin er av teimum ymsu sløgunum, t.e. á hvussu nógvum støðum, tey koma fyri, so varð hvítingsbróðir fingin á 94% av teimum 65 støðunum. Síðani koma m.a. toskur (91%), lítli kongafiskur (86%), hýsa (85%) og upsi (82%).
Verða báðir túrarnir á sumri lagdir saman, só vórðu 57 fiskasløg veidd tilsamans umframt hummara, rækju, skrambul og 5 sløg av høgguslokki,. Mest varð fingið av upsa, og síðani koma hvítingsbróðir, hýsa, gulllaksur, lítli kongafiskur og toskur. Hvítingsbróðir varð fingin á 92% av støðunum, upsi á 87%, lítli kongafiskur á 83%, toskur á 82%, hýsa á 80% og gulllaksur á 72% av støðunum.

Við at bera saman við stovnsmetingarnar, ið verða gjørdar á hvørjum ári, og við veiðutøl hjá fiskiflotanum (veiða upp á roynd), er greitt, at yvirlitstrolingarnar geva eina góða mynd av, hvussu stórir stovnarnir av toski og hýsu eru. Eisini geva tær ábendingar um, hvussu aðrir stovnar eru fyri, m.a. upsi. Á mynd 2 er veiðan pr. støð av úrvaldum sløgum frá báðum túrunum í summar víst samanborið við túrarnar á sumri síðani 1999. Fyri tosk hevur lítið verið at fingið síðani 2003, og serliga árini 2006-2008 var lítið at fáa.

Men í ár bragdaði aftur, og kom veiðan upp aftur á støðið í 2005. Enn er stovnurin tó ikki væl fyri, men tað gleðiliga er, at tilgongdin sær út til at vera munandi batnað. Úrslitini fyri hýsu hava verið støðugt minkandi síðani 2002, og úrslitið fyri í ár er tað minsta síðani 1991. Men eisini her eru batar at hóma, tí tilgongdin, ið hevur verið sera lítil seinastu árini, tykist nú at vera betri aftur. Hóast úrslit viðvíkjandi upsa frá tílíkum yvirlitstrolingum skulu takast við fyrivarni, so benda tølini á, at stovnurin hesi seinastu 3 árini er nakað minni enn árini frammanundan. Longa og brosma tykjast at vera væl fyri, kanska eisini reyðsprøka og stóri kongafiskur, meðan verri stendur til við trantkongafiski, kalva og tungu. Hvítingsbróðir er heilt væl fyri, meðan svartkjaftur hevur verið á sera lítlum støði seinastu 4 árini.

Magakanningar vístu, at fiskurin hevði nokk at eta, og sum heild var fiskurin væl í holdum. Nevnast skal, at á seinastu støðini eystan fyri Sandoynna fingu vit ein merktan tosk. Hann varð merktur á Norðhavinum 23/3 í ár, og var hann tá 63 cm langur og vigaði 2,575 kg. Nú hann varð fingin aftur 20/8, var hann 69,3 cm langur og vigaði 3,795 kg; tað má sigast at vera ein óførur vøkstur upp á bert 5 mánaðar.

Havstovan, 21. august 2009

Jákup Reinert

| Talva 2. | Yvirlit yvir veiðu pr. fiskaslag á MH túri nr. 0964 | | |
|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **Veiða, kg** | **Veiða pr støð, kg** | **Støðir við fiski, %** |
| Upsi | 18622.936 | 286.507 | 82 |
| Gulllaksur | 9466.494 | 145.638 | 57 |
| Hvítingsbróðir | 8403.592 | 129.286 | 94 |
| Hýsa | 4156.679 | 63.949 | 85 |
| Toskur | 3750.191 | 57.695 | 91 |
| Lítli kongafiskur | 3630.692 | 55.857 | 86 |
| Rossamakrelur | 791.599 | 12.178 | 22 |
| Stóri kongafiskur | 693.806 | 10.674 | 45 |
| Svartkjaftur | 682.333 | 10.497 | 51 |
| Silvurmurtur | 629.801 | 9.689 | 20 |
| Knurrhani | 565.387 | 8.698 | 42 |
| Longa | 553.755 | 8.519 | 60 |
| Havmús | 458.741 | 7.058 | 12 |
| Hvítingur | 333.214 | 5.126 | 34 |
| Tindaskøta | 326.472 | 5.023 | 11 |
| Tunga | 207.878 | 3.198 | 60 |
| Skrambul | 173.242 | 2.665 | 57 |
| Makrelur | 170.259 | 2.619 | 23 |
| Trantkongafiskur | 146.831 | 2.259 | 9 |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 142.681 | 2.195 | 11 |
| Reyðsprøka | 111.148 | 1.710 | 31 |
| Brosma | 97.185 | 1.495 | 28 |
| Glaskvoysa | 89.487 | 1.377 | 15 |
| Lítla brosma | 78.689 | 1.211 | 5 |
| Lálla | 76.913 | 1.183 | 14 |
| Blálonga | 58.546 | 0.901 | 12 |
| Kjaftssvarti hávur | 58.281 | 0.897 | 2 |
| Havtaska | 56.220 | 0.865 | 12 |
| Sandsprøka | 54.591 | 0.840 | 29 |
| Agnhøgguslokkur | 33.837 | 0.521 | 8 |
| Búksvarti hávur | 24.464 | 0.376 | 3 |
| Hvassasprek | 22.358 | 0.344 | 17 |
| Steinbítur | 18.880 | 0.290 | 2 |
| Kalvi | 20.508 | 0.316 | 12 |
| Spískaskøta | 20.020 | 0.308 | 9 |
| Mathøgguslokkur | 13.917 | 0.214 | 5 |
| Hummari | 8.292 | 0.128 | 5 |
| Sild | 7.439 | 0.114 | 6 |
| Hvasskvoysa | 6.390 | 0.098 | 2 |
| Bláriddari | 5.126 | 0.079 | 5 |
| Lýrur | 4.290 | 0.066 | 2 |
| Bramafiskur | 2.890 | 0.044 | 3 |
| Streymsild | 2.157 | 0.033 | 2 |
| Hávur | 1.755 | 0.027 | 2 |
| Svartkalvi | 1.245 | 0.019 | 2 |
| Lýsingur | 1.190 | 0.018 | 2 |
| Klingruskøta | 0.905 | 0.014 | 2 |
| Nebbasild | 0.291 | 0.004 | 3 |
| Murrikrutt | 0.202 | 0.003 | 2 |
| Tannhøgguslokkur | 0.185 | 0.003 | 2 |
| Rækja | 0.173 | 0.003 | 9 |
| Gestfiskur | 0.055 | 0.001 | 2 |

| Talva 3. | Yvirlit yvir veiðu pr. fiskaslag á sumri 2009. | | |
|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **Veiða, kg** | **Veiða pr støð, kg** | **Støðir við fiski, %** |
| Upsi | 36196.092 | 180.980 | 87 |
| Hvítingsbróðir | 20728.845 | 103.644 | 92 |
| Hýsa | 14882.326 | 74.412 | 80 |
| Gulllaksur | 13298.964 | 66.495 | 72 |
| Lítli kongafiskur | 11874.255 | 59.371 | 83 |
| Toskur | 11657.062 | 58.285 | 82 |
| Svartkjaftur | 4811.438 | 24.057 | 63 |
| Silvurmurtur | 2754.098 | 13.770 | 26 |
| Longa | 2440.331 | 12.202 | 66 |
| Stóri kongafiskur | 1977.781 | 9.889 | 44 |
| Makrelur | 1575.881 | 7.879 | 33 |
| Knurrhani | 1456.247 | 7.281 | 35 |
| Tunga | 1365.494 | 6.827 | 63 |
| Rossamakrelur | 1269.544 | 6.348 | 15 |
| Hvítingur | 1195.675 | 5.978 | 42 |
| Brosma | 719.539 | 3.598 | 45 |
| Havmús | 718.039 | 3.590 | 7 |
| Trantkongafiskur | 626.898 | 3.134 | 12 |
| Tindaskøta | 622.580 | 3.113 | 8 |
| Skrambul | 531.165 | 2.656 | 68 |
| Blálonga | 463.939 | 2.320 | 19 |
| Reyðsprøka | 396.728 | 1.984 | 31 |
| Havtaska | 351.250 | 1.756 | 24 |
| Sandsprøka | 253.704 | 1.269 | 32 |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 228.479 | 1.142 | 6 |
| Svartkalvi | 220.930 | 1.105 | 4 |
| Agnhøgguslokkur | 195.544 | 0.978 | 16 |
| Mathøgguslokkur | 193.499 | 0.967 | 18 |
| Sild | 137.537 | 0.688 | 25 |
| Kalvi | 133.810 | 0.669 | 10 |
| Kjaftsvarti hávur | 128.927 | 0.645 | 4 |
| Lálla | 127.696 | 0.638 | 9 |
| Glaskvoysa | 121.129 | 0.606 | 8 |
| Hvassasprek | 111.305 | 0.557 | 21 |
| Lítla brosma | 99.575 | 0.498 | 6 |
| Steinbítur | 70.728 | 0.354 | 11 |
| Blágómur | 49.490 | 0.247 | 2 |
| Halahvassa skøta | 25.465 | 0.127 | 2 |
| Búksvarti hávur | 24.464 | 0.122 | 1 |
| Spískaskøta | 18.880 | 0.094 | 1 |
| Skøta | 16.550 | 0.083 | 1 |
| Lýrur | 12.595 | 0.063 | 2 |
| Klingruskøta | 11.221 | 0.056 | 2 |
| Liri | 8.905 | 0.045 | 2 |
| Hummari | 8.292 | 0.041 | 2 |
| Bramafiskur | 6.515 | 0.033 | 2 |
| Hvasskvoysa | 6.390 | 0.032 | 1 |
| Bláriddari | 5.193 | 0.026 | 2 |
| Úlvfiskabróðir | 3.482 | 0.017 | 2 |
| Hávur | 3.455 | 0.017 | 1 |
| Glýsufiskur | 3.059 | 0.015 | 3 |
| Eledone | 2.611 | 0.013 | 1 |
| Streymsild | 2.157 | 0.011 | 1 |
| Úlvfiskur | 1.765 | 0.009 | 1 |
| Krøkilskrutt | 1.418 | 0.007 | 1 |
| Lýsingur | 1.190 | 0.006 | 1 |
| Svartfiskur | 1.170 | 0.006 | 1 |
| Lítla lakstobis | 0.883 | 0.004 | 1 |
| Nebbasild | 0.300 | 0.0015 | 3 |
| Rækja | 0.296 | 0.0015 | 4 |
| Murrikrutt | 0.202 | 0.0010 | 1 |
| Tannhøgguslokkur | 0.185 | 0.0009 | 1 |
| Havnebbasild | 0.179 | 0.0009 | 1 |
| Oktopus | 0.068 | 0.0003 | 1 |
| Gestfiskur | 0.065 | 0.0003 | 1 |




**<u>Mynd 2</u>**. Fyribils úrslit frá yvirlitstrolingunum á sumri við Magnusi Heinasyni síðani 1999 fyri úrvald fiskasløg.